Kappingareftirlitið

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 4
110 Tórshavn

Att: Niels W. Poulsen, adv.

Tórshavn tann 19-02-2024

**Viðv. mál nr.: 24/00016: Yvirtøkan hjá P/f 01.12.2015 av Sp/f Sunda**

Kappingareftirlitið fekk tann 11. januar 2024 einfalda fráboðan, sbrt. § 2 í reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012, um, at P/f 01.12.2015 ætlar at yvirtaka Sp/f Sunda frá P/F Poul Hansen og Sp/f PE Holding. Fráboðanin var fullfíggjað tann 29. januar 2024, sbrt. § 17 , stk. 5, 3. pkt. í kappingarlógini.

Talan er um eina samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 2, tí fyritøka fær ræði á aðrari fyritøku. Yvirtøkan skal fráboðast sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí luttakandi fyritøkurnar høvdu samanlagt í Føroyum ein árligan umsetning, sum var 75 mió. kr. ella meir seinasta ár og minst tvær av luttakandi fyritøkunum høvdu 15 mió. kr. í umsetningi seinasta árið sbrt. §14, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini.

Luttakandi fyritøkur hava fráboðað eftir einfaldum leisti, tí ongin av luttakandi fyritøkunum virka á sama landafrøðiliga marknaði og ongin av luttakandi fyritøkum eru á einum ovara ella niðara marknað til ein marknað, har onnur luttakandi fyritøka er virkin, sbrt. §3, stk. reglugerð nr. 20 frá 20. juli 2012.

P/f Poul Hansen og Sp/f KSJ eiga P/f 01.12.2015 og er talan um felag undir felagsræði. P/f 01.12.2015 eigur og rekur 7 handlar, sum selja gerandisvørur í Fuglafirði, Vestmanna, Glyvrum, Toftum, Vági og Tórshavn.

P/F Poul Hansen og Sp/f PE Holding eiga Sp/f Sunda, sum rekur handil við gerandisvørum við Norðskála.

Kappingareftirlitið hevur við heimild í §15, stk. 5 í kappingarlógini tikið avgerð um at góðkenna yvirtøkuna hjá P/f 01.12.2015 av Sp/f Sunda vísandi til § 15, stk. 2 í kappingarlógini. Sambært ásetingini skal ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, góðkennast.

Vegna
Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Súsanna Thomsen
fulltrúi